Viðmerking:

# Opið bræv til Ríkisumboðið!



**Sjálvstýrið skal ikki skrumblast ígjøgnum:**
Sum danskur/føroyskur ríkisborgari vil eg biðja tygum heit aá donsku stjørnuna um at syrgja fyri, at demokratisk mannagongd verður fylgd, nú samráðingar millum landsstýrið og ríkisstjórnina um fullveldið Føroyar skulu verða.

Tað er eingin loyna, at ein týðandi partur av núverandi limum í landsstýrissamgonguni hava sín politiska uppruna frá umhvørvi, sum ikki kann kallast demokratiskt, og speglast hetta týðuliga aftur íf ørda politikkin. Tað, sum danska stjórnin eigur at gera fyri sínar borgarar í Føroyum, er at tryggja, at eitt so álvarsligt mál, sum fullveldi ikki verður skrumblað ígjøgnum.

**Einaveldi:**
Vit kenna, hvussu Sovjetsamveldið vaks til eitt ovurstórt risaveldi. Taktikkurin var tann sami, sum er við at henda her í Føroyum. Demokratiið hevði valdað í øldir í mongum av hesum londum, til brádliga ein ella onnur orsøk var til misnøgd, so kommunistarnir fingu meirilutan við eitt val. Tá vendist ikki aftur, grundlógin var avtikin, hernaðarstjórn var útnevnd, og alt politiskt virksemi varð bannað.

Um ikki hernaðarstjórn verður sett her í Føroyum, so verður grundlógin avtikin, og allir møguleikar verða burtur at velja sjálvstýri/samband og eingin vegur aftur til ríkisfelagsskapin, sum hevur tryggjað okkum heimsins besta land at liva í, og vit fáa ístaðin sjálvstýri og fátækradømi við øllum teimum skerjingum, sum tað inniber.

Tað hevði verið púra óhugsandi, at nakað annað norðurland vildi gjøgnumført eina so kollveltandi broyting fyri fólkið, ja tikið lívsgrundarlagið undan fólkinum, uttan ein kvalifiseraðan meiriluta av fólkinum og samtykkja broytingarnar yvir tvey valskeið, bæði í tinginum og við almennari fólkaatkvøðu.

**Fólkaatkvøða:**
Tað er eisini umráðandi, at ein fólkaatkvøða verður gjørd soleiðis, at fólkið kann taka støðu til, um tað vil loya frá Danmark ella taka undir við javnaðarupp-skotinum við meiri sjálvstýri innan ríkisfelagsskapin, ella at fylgja sambandsuppskotinum. Møguliga kundu teir síðstnevndu komið ásamt um eitt felags upplegg mótvegis sjálvstýrinum, so veljararnir vita, hvat teir fara at atkvøða um.

Eg eri sannførdur um eitt sera vánaligt úrslit fyri samgonguna, um ein veljarakanning var gjørd nú, har føroyingar vóru spurdir, um teir valdu sjálvstýri sum samgongan leggur upp til, ella um teir valdu meira sjálvstýri innan ríkisfelagsskapin, nakað sum javnaðarflokkurin hevur skotið upp.

Her eigur stjórnin eisini at ansa eftir, at alt fer regluliga fram við at ansa eftir, at fólkið fær møguleika at velja á einum greiðum atkvøðuseðli, og at bert tveir møguleikar verða, nakað sum teir omanfyri nevndu.

**Við hávirðing**
**Jonhard Dahl-Jacobsen**

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

# Sambandsflokkurin - vil broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum. Ongin ivi um tað!

*Eftir nágreiniliga viðgerð og stórt arbeiði, kom Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins. Øll tingmanning og leiðsla floksins standa aftan fyri uppskotið*

Eftir hesum uppskoti, nýtist ongin føroyingur at óttast niðurskurð og hóttafall. Tvørturímóti vil uppskot okkara geva Føroyum pláss ímillum fremstu lond í heiminum. Somuleiðis vil tað gera møguleikar føroyinga innan mong økir, t.d. á útbúgvingarliga, heilsuliga og vinnuliga økinum, betri enn nú. Eisini fáa Føroyar møguleika at taka ímóti størri avbjóðingum, orsaka av eini alsamt øktari alheimsgerð.

Føroyar kunnu gerast alt meiri sjónligar á Heimskortinum. Við teimum møguleikum og avbjóðingum tað ber í sær.

Nýskipanaruppskot sambandsfloksins gevur møguleikar fyri, at fleiri føroyingar kunnu búgva, mennast og fjølgast í Føroyum.

Sambandsflokkurin - at líta á:

Sambandsflokkurin hevur verið við til at byggja Føroyar upp til tað vælferðarsamfelag vit hava í dag. Ikki við at loysa, kvetta og grenja um, at hinir hava skyldina tá ið okkurt miseydnaðist. Men við at arbeiða og taka ábyrgd av tí vit gera. Tað eru jú vit sjálvir, sum ráða í Føroyum.

Hóast baldrut, so er eisini seinasta skeiðið, ið Sambandsflokkurin stóð við ábyrgd og stýrdi, eitt gott dømi um, at væl gekst, hóast ongin, heldur ikki Sambandsflokkurin, kann siga, at allar avgerðir vóru rættar og at als onki mistak var gjørt. Sambandsflokkurin man hava sínar feilir. Men tað man helst vera galdandi aðrar eisini. Men samanumtikið var seinasta valskeið undir Sambandsfloksins leiðslu eitt gott skeið fyri Føroyar. Og manning Sambandsfloksins roynir í sátt og semju, at gera eitt gott arbeiði, saman við viðhaldsfólki kring landið. Tað er alneyðugt, tí í løtuni hóttir fullveldið føroysku tjóðina. Nýskipanaruppskotið - gott - við nógvum møguleikum: Tað gevur okkum møguleika fyri

- - at økja um fyrimunirnar í ríkisfelagsskapinum.
- - at minka um møguligar vansar í ríkisfelagsskapinum.
- - at gera ábøtur, so hvørt, um tað er neyðugt.

Eftir seinasta val munnu flest øll vera samd um, *at heilt greiðar reglur, og aðrar enn tær núverandi, eiga at verða galdandi viðvíkjandi einari møguligari útmeldan úr Ríkisfelagsskapinum, soleiðis at rætt verður farið fram hesum viðvíkjandi.* Vit eiga ongantíð aftur havna í tí óhepnu støðu, har vit nú síggja, at smábroytingar í ólavsøku skrúðgonguni krevja strangari mannagongdir smb stýrisskipanarlógini, enn at fara úr ríkisfelagsskapinum.

Breið semja neyðug:
Sambandsflokkurin vil broytingar sum nevnt í ediliga Nýskipanaruppskoti okkara. Hesar broytingar vilja fremja stóran framburð og ekspansión her á landi, í mun til fullveldisuppskotið. Eftir øllum, sum higartil er komið fram í Hvítubók, Caragata eins og Íslendsku kanningini, vil fullveldisuppskotið geva føroysku tjóðini stórar avmarkingar á nærum øllum økjum.

Tí er neyðugt hjá samgonguni at gera eina breiða semju *innan karmarnar av ríkisfelagsskapinum*. Um Tjóðveldisflokkurin ikki vil ganga við til tað, so vilja bæði Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og helst eisini Miðflokkurin tað. Og ikki at gloyma: Stórir partar av veljarum Fólkafloksins og Sjálvstýrisfloksins. So tann her nevnda breiða semjan vil umboða eina sera stóra fjøld av veljarum, ið ynskja framburð, menning og vælferð her á landi- við øktum sjálvstýri innan ríkisfelagsskapin.



Ríkisfelagsskapurin gevur frælsi:

Fyri mong er ríkisfelagsskapurin ein hornasteinur, í gevur stórar møguleikar í mun til fáar bindingar. Vit koma tí, á flest øllum økjum, at vera meira frí og fræls innan Ríkisfelagsskapin, enn uttanfyri hendan.

Sambandsmaður? Sjálvandi - eg vil búgva í Føroyum!

**Marjus Dam,**
**Løgtingsmaður**

# Russiskur føroyafrøðingur fyllir 75

**(Av tí at villur vóru í hesi heilsan í leygardagsblaðnum, prenta vit heilsanina umaftur og biða høvunda umbera okkum)**
Mánadagin 17. januar 2000 vóru 75 ár, síðan russiski søgufrøðingurin, tjóðfrøðingurin og landafrøðingurin Genrikh Iosifovitsj Anokhin varð føddur í Jejsk við Azovska havið. Hann hevur umframt at granska Russlands søgu starvast við at lýsa lív og kor hjá teimum smáu tjóðunum í Sovjetsamveldinum og haraftrat søgulig og samfelagslig viðurskifti hjá fólkunum í Norðurlondum, eina mest í Noregi, Føroyum og Danmark. Genrikh hevur skrivað nógv, fakligar bøkur, vísindaligar ritgerðir og blaðgreinar. Ein av bókum hansara er einasta heildarlýsingin av Føroyum og føroyingum, ið út er givin í Russlandi, »Na ostrovakh dozjdej«, Moskva 1966. Í Fróðskaparritum, 38.-39. bók, 1989-90 stendur grein eftir G.I. Anokhin, »Føroyingar í russiskum bókmentum«.

Genrikh Anokhin hevur sett fram nýggja teori um, hvussu statsskipan er íkomin í Novgorod í 9. øld. Í uml. 260 ár hevur tann hugsanin verið ráðandi millum søgufrøðingar, at novgorodsmenn í árinum 862 bóðu Rjurik (Hroerek) koma handan hav, helst úr Svøríki, við sínum varjagi (væringjum) at ráða og stýra í Novgorod, tí har hildu teir seg ikki sjálvar duga. Hetta ástøði hevur verið nevnt »normanska teoriin«. Genrikh heldur eftir drúgvar kanningar, ið hann hevur gjørt, vera sannlíkt, at teri, ið skipaðu Novgorodsríkið, vóru ikki skandinaviskir menn, uttan slávar. Um hetta ástøði hevur hann skrivað ritgerð í russiska tíðarritið »Tsjelovek« nr. 4, 1994.

»Hvør í míni fótspor stígur, hann lær ikki alla tíð« er kvøðið. Náttina 14. juli 1938 tók NKVD pápa Genrikhs, og einki frættist aftur um hann fyrr enn fleiri áratíggju seinni. Tá fekk sonurin at vita frá myndugleikunum, at faðirin varð skotin, stutt eftir at hann var tikin. Umsíðir, nú Stalin var burtur, fekk hann heiðursuppreising frá myndugleikunum, tí at hann var ikki sekur í nøkrum brotsverki, skrivaðu teir. Í seinna heimsbardaga var Genrikh í mótstøðurørsluni í Taganrog, sum týskarar høvdu hersett. Seinni fór hann í sovjetska herin og var sum sersjantur við í bardøgunum á suðurhermótinum í Ukrainu. Men SMERSJ (sovjetskur mótnjósningarstovnur) fekk uppspurt, at Genrikh var ímóti Stalinstýrinum, og hann varð settur í sovjetska kz-legu 1944-45. Tá hann varð latin leysur haðani, var hann illa sjúkur og niðurundirkomin. Hóast tað royndi hann at sleppa inn á lærustovn at lesa søgu, sum hann frá ungum árum hevði verið hugaður fyri. Myndugleikarnir vóru trekir at sleppa honum inn, men at enda eydnaðist honum at koma inn á universitetið í Dnjepropetrovsk. Tá hann hevði fingið prógv har, fekk hann av politiskum orsøkum kortini ikki loyvi at arbeiða við tí, hann hevði útbúgvið seg til og fór at arbeiða sum ítróttalærari og bleiv eisini fjallaklintrari. Genrikh hevur staðið fyri kanningarferðum í fjøllum víða hvar í Sovjetsamveldinum, m.a. í Kavkasus, í Sikhote-Alin eysturi ímóti Japanska havinum.

Í 1966 fekk Genrikh licentiatstig við Etnografiska instituttið hjá Vísindaakademii Sovjetsamveldisins og starvaðist hjá hesum stovni, til hann fór frá fyri aldur. Av tí at Genrikh var ikki limur í kommunistiska flokkinum, og pápin hevði verið »fólksins fíggindi«, sum tað æt í Stalintíðini, varð í mong ár sýtt honum loyvi til at fara til londini vestanfyri, ið hann hevði kannað og skrivað um. Ikki fyrr enn í 1988 fekk Genrikh útferðarloyvi og slapp at gera ferð til Danmarkar og Føroya. Seinni var hann aftur í Føroyum, og hann hevur eisini verið í Noregi.



Genrikh Anokhin er limur í Geografiska felagnum hjá Vísindaakademii Russlands, Internationala akademinum fyri samskipan av vísindum og Handilsvirksemi og Føroya Fróðskaparfelag.

Hann hevur givið Føroyum umtalu, ið vit kunnu fegnast um, í heimlandi sínum. Mangur føroyingur man minnast aftur á hugnaligar løtur inni hjá fagnarfólkunum Natasju og Heindriki í Moskvu.

**Valdemar Dalsgaard**



Viðmerking:

# Spennandi hjá suðringum at fylgja við, tá oljulógin kemur aftur fyri tingið

Nú í langa tíð hava vit hoyrt so nógv um útjaðaran, og hvat ið kann gerast fyri at fáa fólk at støðast og annars at menna útjaðaran.

Løgtingsmenn úr útjaðaraøkjum hava sæð tað skeivu gongdina í landinum og hava tosað saman við tí endamáli at virka fyri menning í útjaðaranum. Vit, sum búgva uttan fyri miðøkið, frøddust um hetta stig, tí vit síggja, hvønn veg tað gongur. Onkur í hesum landinum má rópa varskó. Tað kann ikki verða rætt, at alt tað unga fólkið í Føroyum skal savnast rundan um alt tað almenna virksemið í høvuðsstaðnum. Hetta virksemið, sum bara bólgnar upp og riggar verri og verri.

Í Grønlandi hava grønlendingar verið áskoðarar, meðan danir savnaðu alt sum til bar í Nuuk. Nú hava grønlendarar fingið heimastýrið og eru vaknaðir við kaldan dreym. Hendan danska miðsavnan var til stóran skaða fyri fólkið, sum var uppvaksið undir øðrum umstøðum, og nógvar syrgiligar lagnur spurdist burturúr, teir trivust snøgt sagt betur úti á smáplássum.

Grønlendingar siga nú, at skulu teir búgva í landinum, vilja teir búgva í øllum landinum og ikki bara í einum lítlum parti. Hetta er sjálvandi ikki rætt sæð frá einum peningaligum sjónarmiði, (cost benefit) men lívið hevur so nógv onnur og nógv størri virðir, tí hava teir sjálvir lagt á annan bógv.

Nakað av tí teir, eru byrjaðir uppá, er at hava flutt navigatiónsskúlan úr Nuuk til Paamiut. Farma- og bingjuumsitingina úr Nuuk til Manitsoq, hóast høvuðsbingjuplássið er í Nuuk. Øll umsitingin er íbúðarblokkunum og bústaðarplássum bleiv flutt til Sisimiut.

Hetta hevur sjálvandi ikki gingið stillisliga fyri seg, tí nógv av teimum sum arbeiddu á hesum áðurnevndu stovnum noktaðu blankt at flyta við, hesir stovnar eru, hóast stóra mótstøðu, fluttir og virka sum eftir ætlan, Tey, sum ikki vildu flyta við, máttu so finna annað arbeiði.

Hetta eigur at geva okkara fólkavaldu fólkum nakað at hugsa um. Okkara liviháttur er hóast alt ikki so ólíkur teirra.

Støðuna í Suðuroynni kenna øll tey, sum eru sett at stýra landinum, og tey hava ábyrgdina av, at allir føroyingar skulu búgva í øllum Føroyum, undir so eins treytum sum til ber.

Tann fíggjarliga kreppan, sum var fyrst í 90'unum rakti eisini okkum í Suðuroynni hart, serliga vóru óløgini í sunnaru helvt so stór, at tað stendur á at fáa fótafestið aftur. Tær ringastu fylgjurnar eru, at vit hava mist so at siga eitt heilt ættarlið av tí unga fólkinum, og hetta hevur ført til, at vit eru komin í eina ónda ringrás, sum ikki sæst endi á. Tað er tí bráneyðugt at fáa nakað av nýggjum íblástri so Suðuroyggin ikki verður eftirbátur í samfelagnum.

Nú kemur eitt uppskot til Løgtingið um at savna oljuvinnuna í Suðuroynni. Fellur uppskotið, skal vinnan - sum í hesum føri eru stór altjóða feløg - sjálvi avgera, hvar oljuvinnan skal vera her á landi.

Tað er púra natúrligt at plasera tað, sum hevur við hesa nýggju vinnu at gera, í Suðuroynni. Tey oljuøkini, sum hava størstan áhuga, liggja jú fyri durinum hjá suðringum. Hesi økir eru samstundis av bestu fiskileiðum hjá okkara djúpvatnstrolarum og garnaskipum, sum eru heimahoyrandi her suðuri. Sum fiskigrunnar eru hesi økir longu nógv órógvaði av seismikkvirksemi.

Tað, sum vit vanliga hoyra er, at Suðuroyggin liggur so langt burtur, tað er so ikki tilfeldið hesaferð, nú sita vit á fremsta rað. Tá hendan tíðandi avgerðin verður tikin, er tað fyri okkum suðringar, ikki ein spurningur um pengar, tað er tíverri nógv meir enn so, sum stendur uppá spæl, tað er sjálvt tilverugrundarlagið.

Suðringar eru hvørki býttari ella dovnari enn aðrir føroyingar, men tíðarrákið og vinnusamansetingin hevur lagað tað so, at tíðirnar eru broyttar so ómetaliga nógv, lívsvirðini eru ikki tey somu sum fyri bara nøkrum fáum árum síðani, og hetta kenna vit sviðan av nú. Aðrar tíðir hava verið í Suðuroynni, tá støðan var júst mótsatt, og soleiðis gongur tað upp og niður. Í løtuni eru vit tíverri niðri í einum aldudali.



Uppskotið um, hvar oljuveitingarstøðin skal liggja, kemur frá Javnaðarflokkinum. Men hetta uppskotið kann aldrin verða nakað flokspolitiskt mál, her er ikki spurningur um høgravinstra ella samband-fullveldi, so her eiga tingmenn at atkvøða fyri bestu sannføring um, hvat ið er Føroyum at gagni fyrst av øllum.

Fellur hetta uppskotið um av plasera veitingarstøð í Suðuroynni, eri eg stórliga bangin fyri, at tá verður tað ein spurningur um pengar, og nógva rpengar til ymiskt hjálpartiltøk.

Við at taka undir við uppskotinum um, at oljuvinnan skal vera í Suðuroynni fáa løgtingsmenn kjansin nú til at rætta einum øki í Føroyum eina bjargandi hond.

Tað verður sera sera áhugavert at síggja, hvørjir tingmenn sum vísa okkum baki.

**Viberg Sørensen**

# 5.000 GSM fartelefonfelagar

Tá Føroya Tele í 1998 gjørdi íløguna í GSM, varð tað við iva um, hvussu tænastan fór at verða móttikin á tí avmarkaða føroyska marknaðinum. Samanumtikið hevur gingið betur enn væntað, bæði viðvíkjandi felagatalinum, útbreiðsluni, lækkingum í gjøldunum og nýggjum tænastum. Úrslitið er, at felagatilgongdin í 1999 var nógv størri enn væntað.

Sum árið 1999 leið, vísti tað seg, at umleið 5.000 felagar fóru at vera um ársskiftið. Føroya Tele fegnaðist um hetta úrslitið og boðaði frá í desember 1999, at felagi nr. 5.000 fór at fáa ein ferðaseðil til Danmarkar og aftur. Hálvan desember hevði Føroya Tele góðar 4.600 GSM fartelefonfelagar, og spenningur varð, um felagi nummar 5.000 varð skrásettur í 1999. Um ársskiftið vóru 4.966 felagar skrásettir, so málið varð tíverri ikki rokkið, hóast tað var tætt við.



*Poul Henrik Poulsen, marknaðarstjóri hjá Føroya Tele og Sveinbjørg Gunnarsdóttir, sum er tann hepni vinnarin av at vera GSM-felagi nummar 5.000*

Langt var tó ikki komið inn í 2000, fyrr enn felagi nr. 5.000 varð rokkin, tí mánadagin 4. januar keypti Sveinbjørg Gunnarsdóttir í Havn hald nummar 5.000.

Føroya Tele ynskir Sveinbjørg, saman við øllum øðrum felagum, til lukku við GSM haldinum, og sjálvsagt verður eisini okkurt til nummar 10.000.



# Fleiri nevndarfundir

*Tríggjar av løgtingsnevndunum høvdu fund í gjár*

JOHN JOHANNESSEN

Fyrrapartin í gjár høvdu vinnunevndin, trivnaðarnevndin og uttanlandsnevndin fund.

Til viðgerðar hjá vinnunevndini var uppskotið til løgtingslóg um fyrsta útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, uppskotið til løgtingslóg um fast samband um Vestmannasund og uppskot til løgtingslóg um skipa og vørugjøld.

Trivnaðarnevndin viðgjørdi uppskotið til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar »Lov om patienters retstilling«.

Høvuðsmálið á skránni hjá uttanlandsnevndini var ikki, sum væntað, uppritið til samráðingarnar um ríkisrættarligu støðuna. Hetta mál kom ikki nevnini í hendi til tíðina, og tí var høvuðsmálið viðgerð av uppskoti til samtyktar um góðkenning av millumlandasáttmála frá 4. apríl 1997 um mannarættindi og lívlæknafrøði. Eisini vórðu ymisk onnur smámál viðgjørd.

Komið og gerið kvetti!
Útsøla okkara byrjar hósmorgunin 27.01. kl. 9.00 við hópin av góðum tilboðum t.d.:


Ymiskir stivlar reststøddir til børn og vaksin
kr. 29,-
Til børn: Regnsett
kr. 98,-
Kondiskógvar

kr. 98,-
Oljuklæðir - arbeiðsklæðir - tuflur

1/2 prís
Andreas í Vágsbotni
Tlf. 31 20 40 • Tórshavn
Vælkomin inn á gólvið hjá Andreas í Vágsbotni
Sosialurin 311820